Kvøldskúlin
2022/23









# KVØLDSKÚLIN Í EYSTURKOMMUNU







# KVØLDSKÚLIN 2022/23

Seinasta kvøldskúlaár gingu umleið 250 næmingar í kvøldskúlanum í Eysturkommunu. Tá bjóðaðu vit 31 skeið, og í ár fara vit at bjóða ein part av somu skeiðum út aftur. Harumframt fara vit at bjóða fleiri nýggj skeið í ár.

**Tilmelding á heimasíðu**

Tilmelding og gjald fer fram á heimasíðuni hjá kvøldskúlanum: kvoldskulin.eystur.fo

Næmingar, ið ætla sær í kvøld-skúla í Eysturkommunu, kunnu tekna seg frá **3. oktober** **kl. 9.00**

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku.

Skráin og onnur kunning er eisini at síggja á www.eystur.fo

------------------

**Fríbjørg Ljósá, kvøldskúlaleiðari**
Tlf.: 730022
Teldupostur: fribjorg@eystur.fo



## 1. SKAPA TÍNI EGNU BINDIMYNSTUR

**Kom og skapa tíni egnu bindimynstur við Katrinu í Geil**

Lær einfaldar og effektivar mátar at gera bindimynstur úr gomlum mynstrum. Tú fært innilit í kontrastir, rútmu, rætning, stødd og at skapa frið í mynstrinum. Vit arbeiða á pappíri, so tú fært gjørt eina rúgvu og lættliga kanst velja tað besta burturúr til troyggjur og annað gott.

Undirvísari er Katrina í Geil tlf.: 527030

Tíð: mikudagin 26.oktober kl. 18.30-21.30

Staður: Gøtu skúli

Kostnaður: 375 kr.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



## 2. HEILSUGÓÐUR KOSTUR – 6 KVØLD

Vilt tú læra at gera heilsugóðan mat og fáa meira at vita um, hvat heilsugóður kostur er. Og hví slankikurar ikki rigga?

Undirvíst verður eisini í proteinum, feitti, sukurevnum (kolhydratum) og gluten.

Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so er bara at tekna teg.

Skeiðið verður seks mánakvøld frá kl. 19.00 – 22.00.

Byrjað verður 16. januar 2023.

Pláss er fyri 12 luttakarum á skeiðnum.

Undirvísari: Hannilena Jacobsen, tlf.: 756594.

Kostnaður: 400 kr. + tilfar.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



## 3. LÆR TEG AT DREYA (VIKUSKIFTIÐSKEIÐ 2022)

**Endamálið við skeiðnum er at læra næmingin at dreya lutir úr træi.**

Undirvísarin kemur við uppleggum, hugskotum og góðum dømum um arbeiðshátt.

Tað verða 2 skeið áðrenn jól

Skeið 1 verður 4. - 5. nov.

Skeið 2 verður 11. – 12. nov.

Byrjað verður fríggjadag kl. 18.00. Luttakaratalið er avmarkað.

Undirvísari: Signar á Reynatrøð, tlf.: 258500.

Kostnaður: 300 kr. (íroknað tilfar til smærri lutir).

Staður: Gøtu skúli

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo

Eftir ætlan verða tvey líknandi dreyiskeið aftur í mars 2023.

(Nærri kunning seinni)



## 4. DANSISKEIÐ FYRI BØRN UNDIR SKÚLAALDUR

Í vetur verður skipað fyri dansiskeiði fyri børn undir skúlaaldri. Dentur verður lagdur á ymisk sløg av enskum dansi.

Undirvíst verður hósdagar kl. 17.15 – 18.00. Byrjað verður 20. oktober 2022.

Undirvísarar: Magnhild Bólstein, tlf.: 287801

Kostnaður: 200 kr.

Staður: Losjan Glotti.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo

## 5. DANSISKEIÐ FYRI BØRN Í SKÚLAALDRI

Í vetur verður skipað fyri dansiskeiði fyri børn í skúlaaldri. Dentur verður lagdur á ymisk sløg av enskum dansi.

Undirvíst verður hósdagar kl. 18.15 – 19.00. Byrjað verður

20. oktober 2022.

Undirvísari: Magnhild Bólstein, tlf.: 287801

Kostnaður: 200 kr.

Staður: Losjan Glotti.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo

## 6. DANSISKEIÐ FYRI FÓLK Í ALDRINUM 17 ÁR – 100 ÁR+

Í vetur verður skipað fyri dansiskeiði fyri fólk í aldrinum 17 - 100+. Dentur verður lagdur á ymiskar dansir.

Undirvíst verður hósdagar kl. 19.30 - 21.00. Byrjað verður 20. oktober 2022.

Undirvísari: Magnhild Bólstein, tlf.: 287801

Kostnaður: 400 kr.

Staður: Losjan Glotti.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



## 7. KOM OG RØR TEG

**Venja 2 ferðir um vikuna.**

BodyBalance.

Pilates & Slim venjingar (stramma upp).

Búkvenjing – góðar venjingar fyri lør og rumpu.

Eitt sindur av Zumba Mix & Styrki (nakrir fáir dansir).

Skeiðið byrjar mánadagin 17. oktober 2022. Undirvíst verður mánakvøld kl. 19.15 – 21.00 og mikumorgun kl. 06.00 – 07.00.

Undirvísari: Guðrun Malena Hansen, tlf.: 273164.

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á [kvoldskulin.eystur.fo](kvoldskulin.eystur.fo)



## 8. STIMATROYGGJAN

Stimatroyggjan skal sita væl, og tá nyttar uppskriftin lítið. Lær at taka mát, rokna út, tekna einfalt skap at binda eftir og taka hædd fyri sliti og strekki, so tú fær eina troyggju, sum situr væl og heldur leingi. Tú fær innlit í, hvat gott tógv og góðir stokkar eru, hví tær dovnu gera bindiprøvar og hvussu litir, mynstur og litsamansetingar fáa tað góða og vakra fram í tær og tínum kæru.

Undirvíst verður: íalt 12 undirvísingartímar
leygardagin 21. januar kl. 9.00 – 12.00 og 13.00 – 16.00 og
mánadagin 30. januar kl.18.30-21.30. 2023.

Undirvísari: Katrina í Geil, tlf.: 527030.

Kostnaður: 975 kr.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



# 9. SEYMING

**Kom og seyma tað.**

Hevur tú hug at seyma tín egna kjóla, gallakjóla, blusu ella kanska okkurt heilt annað, so er at melda teg til her. Skeiðið byrjar 18. oktober og heldur áfram til jóla.

Undirvíst verður: Týskvøld kl. 18.00-21.15

Undirvísari: Guðrun Malena Hansen, tlf.: 273164.

Kostnaður: 500 kr.

Stað: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



# 10. VATN-FIMLEIKUR 50 ÁR+

Skeiðið er fyri fólk, sum eru 50 ár ella eldri.

Skeiðið byrjar eftir nærri avtalu við læraran.

Undirvíst verður leygardagar frá kl. 11.00 – 12.30.

Undirvísari: Olly Óladóttir Poulsen, tlf.: 737338.

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Svimjihylurin í Leirvíkar skúla.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



# 11. RØRSLA FYRI ELDRI

Skeiðið byrjar eftir nærri avtalu við læraran.

Tilmelding: Maj-Britt Winther, tlf: 280123

Staður: Dagtilhaldið í Gøtubrá – Norðragøta.

Týsdag frá. 15.15, og hósdag frá kl. 15.15.

Skeiðið er ókeypis.



## 12.SKEIÐ Í DESIGNAKNIT BINDIFORRITI/ELEKTRONISKUM BINDIMASKINUM BROTHER/ SILVERREED

**Sum nakað nýtt so verður DesignaKnit bindiforritið bjóðað út saman við elektroniskum bindimaskinum Brother/ SilverReed**.

Skeið í DesignaKnit bindiforritinum saman við elektroniskum bindimaskinum Brother/ SilverReed.

Undirvísari: Laura Hentze, tlf.: 282157.

Tíðarskeið: 3 leygardagar fyri jól og 3 leygardagar aftaná jól, eftir avtalu. Undirvísing er frá 9.30 til 16.30

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



## 13. KLAVERSPÆL 9 ÁR OG UPPEFTIR

**Klaverspæl 9 ár og uppeftir**

Endamálið við undirvísingini er, at hvør næmingur fær spælt tann tónleik, hann hevur áhuga fyri, nótar ella akkordir.

Skeiðið er bæði fyri nýbyrjarar og meira roynd. Tað er einstaklingaundirvísing og einki aldursmark er uppeftir. Møguleiki má vera at venja heima tað, sum man hevur fingið fyri til næstu ferð.

Undirvíst verður týsdag og hósdag.

Skeiðið byrjar eftir heystfrítíðina eftir nærri avtalu við læraran.

Undirvísari: Ronny P. Jacobsen, tlf.: 559996.

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo

Luttakaratalið er avmarkað.



# 14. AT BINDA UPP Á TEG SJÁLVA OG ONNUR

**At binda upp á seg sjálva og onnur/við Katrinu í Geil**

Hvørjar uppskriftir skalt tú velja? Hvørjar litir klæða tær? Skulu børnini hava tað sama sum tú? Tað er munur á at binda eina troyggju og at binda upp á fólk. Her fær tú innlit í kropsskap, litir, tilfar, so tað verður lættari at binda troyggjur, sum klæða væl. Lættari verður eisini at síggja, hvørjar uppskriftir, tú kanst brúka og hvørjar tú ikki skal í holt við. Skeiðið er læruríkt og aha-upplivingarnar eru nógvar. Arbeitt verður við tógvi og á pappíri og tú fær eina rúgvu av amboðum, sum tú kanst brúka beinanvegin. Íalt 8 undirvísingartímar.

Undirvíst verður leygardagin 12. november kl. 9 - 12 og 13 - 16.

Undirvísari: Katrina í Geil, tlf.: 527030.

Kostnaður: 675 kr.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



## 15. BRODERING VEST TIL FØROYSK KLÆÐIR

**Kom og brodera vestin til føroysku klæðini**

Tvey skeið verða hildin, eitt áðrenn jól og eitt aftaná jól.

Skeið 1 vika 45 7., 8., 9., 10. og 11. november frá kl. 17-21

Skeið 2 vika 6 6., 7., 8., 9. og 10. februar frá kl. 17-21

Undirvísari: Magnhild Bólstein, tlf.: 287801.

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



# 16. GITTAR 9 ÁR OG UPPEFTIR

**Gittar 9 ár og uppeftir**

Endamálið við undirvísingini er, at hvør næmingur fær spælt tann tónleik, hann hevur áhuga fyri, nótar ella akkordir.

Tað er einstaklingaundirvísing og einki aldursmark er uppeftir.

Skeiðið byrjar eftir heystfrítíðina eftir nærri avtalu við læraran.

Undirvísari: Kári Bærendsen, tlf.: 748484.

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



# 17. TRUMMUR

**Kom og spælið trummur**

Skeiðið byrjar eftir heystfrítíðina eftir nærri avtalu við læraran.

Undirvísari: Fríði Bjarkhamar, tlf.: 219329.

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Leirvíkar skúli.

Tilmelding og gjald fer fram á kvoldskulin.eystur.fo



## 18. FØROYSKT TRÆSKIPASMÍÐ

**Lýsing av skeiðnum:**

Arbeitt verður við at seta 103 ára gamla motordeksbátin (sluppungan) FD 343 Gæsa í stand. Báturin er upprunaliga bygdur við Hórará í Vestmanna til brøðurnar Tummas Jákup og Petur Jákup Thomsen í Norðragøtu. Upprunaliga kallaðist bátur Brynhild og hevur seinni havt nøvnini Leynarfoss og Skorhamar.

Ætlanin er at fáa bátin at sigla aftur og eisini verða partur av savninum Blásastova.

Gudmund S. Norðbúð, sum hevur lært til skipstimbrara í Noreg kemur at undirvísa í vetur. Farið verður í holt við at skifta bond og gera annað arbeiði ið hoyrir hesum gamla hondverkið til.

Undirvísari: Guðmundur Sjúrðarson Norðbúð

Telefon: Gudmund: 263169, Arni 223360

Dato: 22.okt - 1. apríl (4 ferðir)

Dagur/Klokkan: Eftir avtalu (2 ferðir í heyst + 2 ferðir í vár)

Stað: Torvalds Kaffi / Eiði

Kostnaður: 100,00 kr

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 19. VIKUSKIFTISSKEIÐ Í MÁLING

**Kom og mála**

**Tvey skeið verða boðin út.**

Skeið 1   20. – 21. januar

Skeið 2   10. – 11.  mars

Undirvíst verður: fríggjadag kl. 18 -22 og leygardag kl. 10 - 17

Undirvísari: Finleif Mortensen, tlf.: 211306.

Kostnaður: 300 kr.

Staður: Gøtu skúli

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 20. MATGERÐ

**Undirvíst verður seks kvøld fram til jóla.**

Kom og lær grundleggjandi matgerð.

Hvussu fært tú altíð eina góða steik og hvussu fært tú sósina at smakka væl hvørja ferð?

Skeiðið byrjar: týsdagin 18. oktober kl. 17 - 21

Tilmelding: Magnhild Bólstein, tlf.: 287801.

Staður: Gøtu skúli.

Kostnaður: 500 kr.

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 21. DRAMA (13 ÁR OG ELDRI)

**Skeiðið byrjar eftir heystfrítíðina. Undirvíst verður týsdagar frá kl. 19-21.**

Í dramaskúlanum lærir tú alt, sum tær tørvar at vita og duga, tá tú skal spæla sjónleik. Vit spæla nógv dramaspøl og hava venjingar, sum skulu læra okkum at duga og tora at traðka fram og at fortelja søgur á palli.

Fyri at tora at framføra sjónleik, er neyðugt kenna seg væl og tryggan. Hetta er høvuðsendamálið á dramaskúlanum.

Í ár fara vit at gera eitt ræðsluhús. Hetta fara vit at arbeiða við fram til februar mánaða, tá ræðsluhúsið fer at hava sýningar.

NB: Um barnið hevur stuðul í skúlanum, er eisini neyðugt at hava stuðul við á dramaskúlan.

Undirvísari: Noomi Reinert, tlf.: 228901.

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Losjan Glotti.

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 22. DRAMA (9-12 ÁR)

**Skeiðið byrjar eftir heystfrítíðina. Undirvíst verður týsdagar frá kl. 17-19**

Í dramaskúlanum lærir tú alt,sum tær tørvar at vita og duga, tá tú skalt spæla sjónleik. Vit spæla nógv dramaspøl og hava venjingar sum skulu læra okkum at duga og tora at traðka fram og at fortelja søgur á palli.

Fyri at tora at framføra sjónleik, er neyðugt kenna seg væl og tryggan. Hetta er høvuðsendamálið á dramaskúlanum.

NB: Um barnið hevur stuðul í skúlanum, er eisini neyðugt at hava stuðul við á dramaskúlan.

Undirvísari: Noomi Reinert, tlf.: 228901.

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Losjan Glotti.

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 23. SVIMJING OG SPÆL FYRI BØRN OG UNG Í BERA BREK

Endamálið er at læra seg at svimja og klára seg í vatni.

Hetta verður gjørt við spæli og venjingum so sum at flóta, læra rættan andadrátt og ymiskar svimjihættir.

Harumframt skulu vit sjálvandi hava tað stuttligt saman.

Skeiðið byrjar eftir heystfrítíðina.

Undirvíst verður: leygardagar: kl. 12.30-14.00

Undirvísarar: Malan Jóhansdóttir, tlf.: 590216 og Ella Hanna Andreasen tlf: 595020.

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Svimjihylurin í Leirvíkar skúla.

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 24. GLASLIST

**Skeiðið byrjar: týskvøldið 21.02.2023**

Undirvíst verður: fimm týskvøld kl. 18 - 21

Undirvísarar: : Anja Skoradal, tlf.: 751884 og Annika Gleðisheygg tlf.: 788029.

Kostnaður: 400 kr umframt tilfar.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 25. UNDIRVÍSING Í CD-ORÐ FYRI ORÐBLINDUM, LESI- OG SKRIVIVEIKUM

Skipað verður fyri undirvísing fyri orðblindum, lesi- og skriviveikum.  Undirvíst verður í at brúka forritið CD-ORÐ, og í øðrum hjálpiamboðum

Undirvísingin kann vera fyri einstaklingar, ella í smærri bólki, og er fyri yngri sum eldri, og verður tillagað til einstaka persónin.

Undirvísarar eru: Annika Katrin Joensen, tlf. 264198 og Birgitte Arent, tlf. 743245

Tilmelding fer fram, við at seta seg í samband vid undirvísararnar.

Skeiðið byrjar eftir avtalu við undirvísarnar.

Stað: Skúlin í Leirvík

Skeiðið er ókeypis.

# 26. VIRKA OG BREGDA HOSUBOND

Skeiðið byrjar eftir avtalu við undirvísararnar.

Undirvísarar: Bára Joensen, tlf.: 227836

Kostnaður: 200 kr.

Staður: Glyvrahanusarhús í Norðragøtu.

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 27. TALV

**Kom og telva mikudagar í Gøtu skúla**

Mikudagar frá kl. 18.00-20.00.

Undirvísarar: Benjamin Tvørfoss, tlf.: 588660 og Petur Páll Mikkelsen, tlf: 282082

Kostnaður: 200 kr.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



# 28. SEYMA BUKSUR TIL FØROYSK KLÆÐIR

**Lær at seyma buksur til tey føroysku klæðini**

Undirvísari: Tóra Tórgarð

Undirvíst verður, tveir leygardagar og tvey týskvøld

Dato: leygardag. 19. november og 3. desember

Dato: týskvøld. 22. november og 29. november

Kostnaður: 670 kr.

Staður: Gøtu skúli

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 29. BLÝANTSTEKNING

**Hevur tú hug at læra at tekna alt møguligt og ómøguligt.**

Undirvíst verður hóskvøld frá kl. 19.00-22.00.

Byrjað verður 20. oktober 2022.

Undirvísari: Tummas Jákup Thomsen, tlf.: 586152

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Gøtu skúli.

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 30. SEYMA VEST TIL FØROYSK KLÆÐIR

**Lær at seyma vest til tey føroysku klæðini**

Undirvísari: Tóra Tórgarð

Undirvíst verður 12.,13.,14. og 17 januar 2023

Tíð: 12., 13 og 17 januar kl. 15 -21

Tíð: 14. januar kl. 10.00 -18.00

Kostnaður: 670 kr.

Staður: Gøtu skúli

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 31. SEYMA SKJÚRT TIL FØROYSK KLÆÐIR

**Lær at seyma skjúrt til tey føroysku klæðini**

Undirvísari: Tóra Tórgarð

Undirvíst verður 4., 5. og 8. november

Tíð: 4. nov. kl.15.00-21.15

Tíð: 5. nov. kl.10.00-16.15

Tíð: 8. nov. kl.15.00-21.15

Kostnaður: 500 kr.

Staður: Gøtu skúli

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 32. KREATIV HONDBINDING

**Finn stokkarnir fram saman við Maiken Steinberg**

Kom á kreativt bindiskeið, har dentur verður lagdur á ymsar binditeknikkir. Kreativt og spennandi bindiskeið við nógvum øðrvísi binditeknikkum á skránni, eitt nú skuggabinding, vevibinding, snarbinding, holmynstur, intarsia o.m.a møguleiki er eisini at binda kantar, t.d blondu- og frynsakantar og at brodera á bundið.

Undirvísari: Maiken Steinberg

Undirvíst verður leygardag kl. 14.00-17.00 tilsamans 10 leygardag.

Kostnaður. 640 kr.

Staður. Húsið hjá Karli.

Byrja verður 22. Oktober.

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



# 33. BOVLING FYRI UNG VIÐ SKERDUM FØRLEIKA

**Bovling fyri ung við skerdum førleika.**

Aldur: Frá 14 ár og uppeftir.

Bovla verður eitt kvøld um vikuna í 1 tíma.

Hósdag frá kl. 17.00-18.00.

Undirvísarar. Sigrun Magnussen, tlf. 508788.

Kostnaður. 300 kr.

Staður. Bovling í Leirvík

Tilmelding og gjald fer fram inni á kvoldskulin.eystur.fo



## 35. PRUTLKOYRIKORT

Møguleiki verður fyri at taka prutlkoyrikort í Eysturkommunu.

Skeiðið er skipað í samstarvi millum Fuglafjarðar kvøldskúla og Kvøldskúlan í Eysturkommunu.

Nær: Skeiðið byrjar væntandi í mars 2023 og kunnað verður á facebook, tá klárt er at melda til.

Høli: Brandstøðin í Leirvík.

Kostnaður: 1.900 kr.

Lærari: Sandy í Lambanum, tlf. 217677

Tilmelding: kvoldskulin.eystur.fo

Treytin fyri luttøku er, at næmingurin er fyltur 15 ár í seinasta lagi

1. juni 2023.

Gott, um foreldur/verji er við fyrsta kvøldið.

Havi eisini dóps- ella navnabræv og passmynd við.

Um skeiðið:

Bólkur AM 15 ár 30 km/t. Skeiðið er 35 undirvísingartímar, ávikavist 15 tímar í teori, 12 tímar í venjingarkoyring og 8 tímar í fyrstuhjálp. Fyrstu undirvísingartímarnir eru í teori.

# 36. UNDIRVÍSING FYRI TILFLYTARAR



## UNDIRVÍSING FYRI TILFLYTARAR

**"Lessons in Faroese language and society for foreigners living in Eysturkommuna."**

**Skeiðið er fyri tilflytarar (nýbyrjarar og nakað framkomin).**

**Hóskvøld kl. 19:00-21:00 (møguliga onkrar leygardagar eisini)**

**Stað: Leirvíkar skúli**

**Lærarar: Tórhild og Rúni Bjarkhamar**

**It is not necessary to register. We begin October 20st.**

**You can also register on tlf. 273329**

During the course we will learn how to make ourselves understandable in Faroese. We are going to learn the alphabet, pronounciation, various greetings, to say who we are, and where we live, working related dialogue and more that we jointly feel is necessary. The purpose of the course is also to help you better understand Faroese society.

You don't need to bring books for the courses, but pen, paper and enthusiasm are quite practical ☺

Eysturkommuna

## 37. UNDIRVÍSING FYRI TILFLYTARAR



# Teaching on regular weekdays at Kambsdalur

Miðnám á Kambsdali, in collaboration with the Ministry of Education, teaches Faroese for immigrants, who do not have Faroese as their mother tongue.

Students learn Faroese language and about society and culture. The course is organized in accordance with the CEFR scale. Also, the students are screened before classes commence. Teaching takes place in Miðnámskúlin á Kambsdali premises, beginning in September and in January/February.

Teaching is for 15 -20 weeks, 4 lessons a day, 5 days a week on all regular weekdays. The course concludes with an exam, and each student receives either a certificate from a position exam, which gives access to further education in Faroese as a second language or a final diploma.

Class attendance is compulsory, and students must be active in studies to be nominated for the exam. There is no tuition fee, but students pay for teaching materials. Miðnám á Kambsdali is responsible for the practicalities of the course.

The course starts om 31th of October andregistration deadline is 15th of October For any further assistance, please contact Helena Dam á Neystabø in Ministry of Foreign Affairs, Education and Cuture, Óli Wolles, Course Leader at Miðnám á Kambsdali, or the leader of The evening School in Eysturkommuna.

Óli Wolles, Course Leader in Kambsdal tel.: 610805 email.: olw@kambdalur.fo

Fríbjørg Ljósá, Leader of Evening School, tel.: 730022 email.: kvoldskulin@eystur.fo

# 37. UNDIRVÍSING FYRI TILFLYTARAR



Miðnámsskúlin á Kambsdali skipar í samstarvi við Mentamálaráðið fyri undirvísing í føroyskum ætlað tilflytarum, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál. Næmingarnir læra føroyskt og um samfelag og mentan. Skeiðið er skipað eftir CEFR-stiganum, og verða næmingarnir visiteraðir, áðrenn undirvísingin byrjar. Undirvísingin fer fram í Miðnámi á Kambsdali og byrjar mánadagin 31.oktober. Undirvíst verður 15-20 vikur, 4 tímar um dagin, 5 dagar um vikuna gerandisdagar. Skeiðið endar við roynd, og hvør næmingur fær annaðhvørt prógv frá stigroynd, sum gevur atgongd til framhald í útbúgving í føroyskum sum annaðmál, ella endaligt prógv frá støðuroynd. Møtiskylda er á skeiðnum, og skal næmingurin vera lestrarvirkin fyri at verða innstillaður til próvtøku. Skeiðið er ókeypis, men næmingar gjalda fyri undirvísingartilfar.  Miðnámsskúlin skipar fyri tí praktiska í sambandi við skeiðið.

Skeiðið byrjar 31. oktober 2022 og tilmeldingarfreistin er 15.oktober. Nærri kunning fæst við at venda sær til Helenu Dam á Neystabø, fulltrúa í Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Óla Wolles, útbúgvingarleiðara á Miðnámi á Kambsdali, ella til kvøldskúlaleiðsluna í Eysturkommunu.

Óli Wolles, útbúgvingarleiðari á Kambsdali tlf.: 610805 teldup.: olw@kambdalur.fo

Fríbjørg Ljósá, kvøldskúlaleiðari, Eysturkommuna tlf.: 730022 teldup.: kvoldskulin@eystur.fo

# 38. BARNAKÓR Í EYSTURKOMMUNU

**NÝTT BARNAKÓR Í EYSTURKOMMUNU.**

Nú fáa øll børn, bæði gentur og dreingir í 3-7 flokki, møguleika fyri at syngja í barnakóri í Eysturkommunu. Tað eru leiðandi kreftirnar í Gøtu Kirkju Ungdómskóri, sum koma at standa fyri kórinum.

Símun Hammer, kórleiðari og organistur í Gøtu kirkju, hevur evstu ábyrgd av kórinum, men sjálvar venjingarnar koma Frida Hammer og ein afturat at taka sær av.

Málið er, at øll læra at brúka røddina so tíðliga sum gjørligt og soleiðis skapa grundarlag fyri eini góðari sangrødd, tá ein gerst eldri.

Kórið fer at venja í Gøtu kirkju hvønn hósdag, væntandi frá kl. 17.30 - 19.00 (tíðspunktið er ikki endaligt - tað kann broytast).

Byrjað verður hósdagin 20. oktober.

Kórið er ókeypis at luttaka í, og øll, sum ynskja at byrja í hesum nýggja barnakórinum, kunnu seta seg í samband við Símun Hammer á tel. 566 600 ella á teldupost simun.hammer@gmail.com

## 39. FØROYSKUR DANSUR Í GLYVRAHANUSARHÚS

# Glyvrahanusarhús



**Vælkomin í Glyvrarahanusarhús til føroyskan dans.**

**Hvørt mánakvøld kl. 19.00 – 20.00.**

**Øll eru vælkomin.**

**Einki aldursmark.**

**Melda til inni á**

**Kvoldskulin.eystur.fo**

**Melda til inni á**

**Kvoldskulin.eystur.fo**

**Frá 3. oktober 2022 kl. 09.00.**

Eysturkommuna